FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Argir, tann 14. januar 2011
J.Nr.: 6345-0047/2011 / 1
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: TP

Tygara skriv:

**Viðv. transportum hjá kommunum**

Boðast skal frá at Fíggjarmálaráðið frá 1. januar 2011 ger nýggja tulking av § 52 í løgtingslóg um kommunustýri (Kommunustýrislógin) við viðhoyrandi kunngerð.

Við nýggju tulkingini eru transportar (t.e. avtalur/treytir um, at gjaldingar frá triðjapørtum skulu rindast til ávísar kontur o.t.) umfataðar av ásetingunum í nevndu lógargrein og kunngerð. Tað merkir, at kommunur frá 1. januar 2011 ikki kunnu veita transport uttan at landsstýrismaðurin hevur givið loyvið.

Vegna Fíggjarmalaráðið

Terji Petersen

**Terji Petersen**
ráðgevi

Kvíggjartún 1 • Postsmoga 2039 • FO-165 Argir
Telefon: + 298 35 20 20 • Telefax: + 298 35 20 25 • E-mail: fmr@fmr.fo